


## ALS væl fyri at taka móti øktum arbeiðsloysi

Heimsumfatandi búskaparkreppan tók seg av álvara upp í september 2008 og hevur spjatt seg til fíggjarmarknaðirnar kring heimin. Arbeiðsloysið var í miðal í 2008 1,3 prosent. Við endan av apríl 2009 er arbeiðsloysið 3,4 prosent og Landsbankin metir, at arbeiðsloysið kann koma uppá 4 prosent í miðal fyri 2009. 14. mai 2009 samtykti Løgtingið umfatandi broytingar í ALS lógini, mest týðandi broytingarnar eru millum annað at útgjaldið hækkar upp í 80 prosent av útrokningargrundarlagnum, tó í mesta lagi 20 tús. kr. fyrsta árið og 75 prosent restina av útgjaldsdøgunum. Bíðidagarnir fella burtur, útlendingar kunnu eftir umsókn verða frítiknir at rinda ALS gjald, og skipan verður gjørd til fiskimenn, tá skip verða løgd í longri tíð í samband

við umvæling. Lógarbroytingarnar hava við sær, at útgjaldið til arbeiðsleys verður økt, og kemur hetta at ávirka rakstrarúrslitið hjá Arbeiðsloysisskipanini og kemur skipanin at hava hall nøkur ár. - Men vísandi til at eginognin er slakar 700 milliónir krónur, er skipanin væl fyri at taka ímóti einum øktum arbeiðsloysi, sigur ALS um útlitini fyri 2009.

# Mannminkandi at biðja danir um hægri blokk

**Nú fer landsstýrið at brynja seg til samráðingar við danir um ríkisveitingina fyri tey næstu árini. Har verða allir møguleikar umrøddir, eisini møguleikin at biðja danir um hægri ríkisveiting, men tað er at bíta høvdið av allari skomm, heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum**

RÍKISVEITING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er mannminkandi nú at fara danir um at hækka ríkisveitingina til Føroyar aftur.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Nú fer landsstýrið undir at fyrireika eitt upplegg til samráðingar, sum vera við donsku stjórnina seinni í ár um ríkisveitingina tey næstu árini.

Landsstýrismaðurin væntar, at tær samráðingarnar verða seinni í summar ella í heyst.

Í hesum sambandi hava góð ráð ikki trotið og tað hava serliga verið sambandsmenn, sum hava mælt landsstýrinum til at hækka blokkin aftur.

Blokkurin hevur verið fastfrystur síðani 2002. Tað merkir, at hann er ikki hækkaður hesa tíðina, hóast prísirnir eru uppfarnir.

Og nú føroyski búskapurin er í kreppu, hevur Edmund Joensen, fólkatingsmaður, mælt landsstýrinum til at samráðast við danir um at tiðna blokkin aftur. Síðani hevur Jaspur Vang, løgtingsmaður, eisini heitt á landsstýrið um tað sama, men hann heldur, at meirinntøkan skal brúkast til at sanera kommunuskuldina við.

### Kanna allar møguleikar

Jóannes Eidesgaard sigur, at nú samráðingar skulu vera um blokkin, verða allur møguleikar kannaðir og vigaðir í samgongini, eisini møguleikin at tiðna blokkin aftur, so at ríkisveitingin hækkar.

- So fer bara tíðin at vísa, hvat endaliga niðurstøðan verður, leggur hann afturat.

Kortini ásannar hann, at eftir samgonguskjalinum hevur samgongan sett sær sum mál at minka blokkin, so hvørt sum búskapurin veksur.

Hann ásannar eisini, at tað stendur onki í samgonguskjalinum um tann møguleikan at hækka blokkin aftur.

### Skomm

Men skal Jóannes Eidesgaard siga sína egnu hugsan, so smakkar tað honum rættiliga illa at tosa um tann møguleikan at hækka ríkisveitingina aftur.

- Eg haldi, at tað mannminkandi at biðja um hægri ríkisveiting, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

- Eg haldi, at teir trupulleikar, vit eru í, eiga vit at klára sjálvir, uttan at biðja um hægri ríkisveiting. Vit skulu heldur ikki gloyma, at danski búskapurin hevur tað heldur ikki gott, so at fara til teirra at biðja um hægri ríkisveiting, hóvar mær ógvuliga illa sigur Jóannes Eidesgaard.

- Eg haldi, at hetta er at bíta høvdið av allari skomm, leggur hann afturat.

Hann heldur eisini, at hetta hevði verið eitt afturstig, tí tað hevði verið eitt stig burtur frá einum sjálvberandi búskapi.

Hann hevur eisini merkt sær, at hann er ikki einsamallur í samgonguni um hetta sjónarmiðið.

- Tað eru eisini aðrir politikarar í samgonguni, sum halda lítið um tann møguleikan at hækka ríkisveitingina aftur, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Kortini endurtekur hann, at hetta er ein spurningur, sum er til politiska viðgerð í landsstýrinum í løtuni og enn dugir hann onki at siga um úrslitið.



*Nú samgongan roynir at semjast um, hvørji tiltøk skulu setast í verk fyri at basa kreppuni, verða allir møguleikar kannaðir fyri at útvega landskassanum fleiri inntøkur. Eisini møguleikin fyri at hækka ríkisveitingina verður kannaður, men tað smakkar Jóannesi Eidesgaard øgiliga illa*

# Nýggjar bøkur frá Heimamissiónsforlagnum

**Heimamissiónsforlagið hevur givið út eitt arbeiðshefti til lærubókina »Søgan um Jesus«, sum kom út fyri nøkrum árum síðan, og tríggjar nýggjar barnabøkur »Farbíblia«, »Á ferð gjøgnum Bíbliuna« og »Bíblia til tey minstu«**

Heimamissiónsforlagið hevur givið út eitt arbeiðshefti til lærubókina »Søgan um Jesus«, sum kom út fyri nøkrum árum síðan.

»Søgan um Jesus« við arbeiðshefti er ætlað krisniundirvísingini í miðdeild fólkaskúlans. Uppgávurnar eru fjølbroyttar. Næmingarnir skulu práta um ymisk evni, svara spurningum skrivliga, loysa kvissuppgávur og orðagátur, gera ymiskt ítriv og spæla sjónleik.

Hvør kapittul byrjar við einum sangi. Sangirnir standa aftast í arbeiðsheftinum. Í lærubókini »Søgan um Jesus« eru nógvar góðar myndir, sum eru væl egnaðar at tosa um, samstundis sum arbeitt verður við bókini og arbeiðsheftinum. Arbeiðshefti er prentað á gott pappír, soleiðis at tað er vælegnað at tekna í. Arbeiðsheftið er 150 blaðsíður.

Tað eru lærararnir Eyðgerð Abrahamsen og Petra Gregersen, sum hava staðið fyri útgávuarbeiðinum. Arbeiðsheftið kann keypast í bókahandlum kring landið og frá Heimamissiónsforlangum: www.hmf.fo.




### Farbíblia

Í hesi farbíbliu fyri børn eru 23 bíbliusøgur sagdar á løttum máli. Teimum smæstu dáma væl at bera hana við sær. Um somu tíð kunnu tey byrja at lærar nakrar av mest lisnu bíbliusøgunum. Bókin hevur honk, so hon kann berast sum ein taska. Perman er úr plasti, so hon er løtt at turka av um hon verður handskað. Blaðsíðurnar inni í bókini eru úr tjúkkum pappi, so bókin tolir væl at verða handfarin av smáum fingrum. Aldur 1-4 ár.

### Á ferð gjøgnum Bíbliuna

Ein bóklingur við einum stórum samanfaldaðum korti, til at seta klistrimerkir á. Klistrimerkini kunnu setast á og takast av fleiri ferðir. Kortið lýsir tíðina heilt frá Skapanini og fram til Jesu lív á foldum. Niðast á kortinum er ein tíðarlinja við bíbliuávísingum, so tú kanst síggja og lesa meira um tey ymisku tíðarskeiðini og hendingarnar í Bíbliuni. Jón Eli Ole-Jacobsen Hevur týtt bókina úr enskum

### Bíblia til tey minstu

Ein myndabók við nærum ongum teksti til tey allarminstu børnini. Á hvørji síðu stendur ein tilvísing í Bíbliuni har ein kann lesa frásøgnina sum myndin vísir. Bókin er úr pappi,

*mg*